


# Sosialurin gevur tær Føroya størsta ólavsøkublað

Við 128 spennandi litsíðum man ólavsøkublaðið hjá Sosialinum vera størsta blað, sum nakrantíð er framleitt í Føroyum

Í dag fáa føroysk húski ólavsøkublaðið hjá Sosialinum ókeypis í postkassarnar.

Við 128 síðum av spennandi lesnaði og lýsingum, er ólavsøkublaðið í ár helst størsta einstaka blað nakrantíð í landinum.

Í blaðnum er ein ørgrynna av lesnaði, mest til skemt, men eisini okkurt til álvara.

Les um parlagið, sum stendur sína roynd á ólavsøku og um serføroysku ólavsøkukenningina. Finn svarið upp á, hví tríggir føroyskir miðlaredaktørar høvdu eitt skulkiskema, tá teir gingu í studentaskúla. Og hvat sigur R.C. Effersøe á Tinghúsvøllinum í samrøðu við Tórodd Poulsen? Í ólavsøkublaðnum kanst tú eisini lesa um gestaboð og fólkaskikk á ólavsøku, og um vakmyndatólini, sum síggja allar ólavsøkusyndirnar.

Í ólavsøkublaðnum finnur tú eisini umrøður av tiltøkum, sum verða á ólavøku, og ikki minst: Stóru skránna fyri alla ólavsøkuna.

-rd

**Viðmerkingar frá ritstjóranum til brævið á høgru síðu:**

1. Christian Matras og William Heinesen gikk sammen på Realskolen i Tórshavn 1912-1916. Da Christian Matras høsten 1916 gikk det siste året på realskolen, var William Heinesen blitt elev ved Købmandsskolens forberedelsesklasse i København (Brovst 1987:18).

2. Jeppe Aakjær (1866-1930), dansk dikter fra Jylland. Aakjær er særlig er kjent for sine folkelige dikt, men skrev også sosialrealistiske romaner og folkelivsskildringer. De sangbare diktene „Jeg er havren" og „Jens vejmand" ble oversatt til færøysk av Christian Matras. Jf. brev 90.

3. Karl, ofte kalt Carli, er Carl Johan Bech (1895-1988), som ble Færøyenes første dyrlege og var i stillingen fra 1918 til han ble pensjonert i 1961 (Johannessen 2007:399). Han var i slekt med William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen, var fem år eldre enn dem og hadde status som høvding for de andre guttene i barndommen. I 1912 ble Carl Johan Bech veterinærstudent ved Landbohøjskolen i Danmark og tok avsluttende eksamen i 1917(Brovst 2000: 9ff, 48-49).

4. Christian Matras ble opptatt som elev ved Sorø Akademi høsten 1917.

5 Christian Matras var „losjerende" hos Sigrid Lützen fra Sandoy, som hadde flyttet til Tórshavn da hun ble enke og tok skoleelever i pensjon (Skarðhamar 1996:23, Debes Dahl 2001:110f).

*Úr »Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoydal«*

*Persónlig hjartasuff, bókmentakjak, politikkur ... Brøvini hjá Chr. Matras, William Heinesen og Karsten Hoydal reika víða í sermerktari útgávu frá forlagnum Fróðskapur*







# Bersøgin brøv hjá Heinesen og Hoyd

**Nýggj bók gevur óvanligt innlit í sera bersøgið brævaskifti millum tríggjar av okkara mætastu rithøvundum , Christian Matras, William Heinesen og Karsten Hoydal**

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Christian Matras' brevveksling med William Heinesen og Karsten Hoydal« er heitið á heilt sermerktari útgávu hjá forlagnum Fróðskapur, sum júst er komin í bókabúðirnar.

Talan er um onki minni enn brævaskifti, sum teir tríggir rithøvundarnir Chr. Matras, William Heinesen og Kartsten Hoydal høvdu í tíðarskeiðnum frá endanum á fyrra heimsbardaga til nakað eftir seinna heimsbardaga. Í bókini fær lesarin høvi at fylgja við í einum sera livandi, persónligum og ofta rættiliga bersøgnum "brævapráti" milllum teir tríggjar høvundarnar. Hartil gevur útgávan ein sjáldsaman møguleika at fáa innlit í ikki minst føroyskt bókmentaligt virksemi í hesum tíðarskeiðnum.

**Bersøgin brøv**

Tað er Anne-Kari Skarðhamar, sum skrivaði Ph. D.ritgerð um partar av ritverkinum hjá Christiani Matras, sum hevur fingið skrivað brøvini av. Hartil hevur hon kryddað brøvini við viðmerkingum og frágreiðingum til ymiskar tilsipingar og persónar, so lætt er hjá lesaranum at fylgja við.

Umframt arbeiðið at geva út bókmentaligt tilfar, kjakast teir tríggir høvundarnir um og gera viðmerkingar til tekstir hjá hvørjum øðrum. Í brøvunum gera teir eisini metingar av tekstum hjá øðrum høvundum, og kjakast annars um mentan, politikk og heimligar bókmentir sæð í ljósinum av norðurlendskum og evropeiskum bókmentum.

Sum heild eru teir sera bersøgnir í hesum brøvunum og tað kann væl hugsast, at onkur lesarari fer at hveppa seg við av útsøgnum um ávísar persónar ella hendingar.

Í støðum hava brøvini ein meiri privatan dám, har tey til dømis snúgva seg um